# 2018 - og hvat so ?

Inngangur

Í 1977 verður 200 fjóðringa fiskamark sett fyri føroyska landgrunnin og aðrar grunnar í Norðuratlantshavi. Hetta hevur víttfevndar avleiðingar fyri fiskiskapin í londunum. Í Føroyum verður roynt við stuðulsskipanum har aðalmálið er at skapa so nógv arbeiðspláss sum til ber. Í endanum á 80 árunum og byrjanini av 90 árunum gongur galið hjá føroyingum. Øll fiskivinnan verður endurreist í 1994 við danskari fígging við treytum. Nú skal fiskivinnan regulerast við lógini um vinnuligan fiskiskap sum verður broytt í 1996 til eina fiskidagaskipan. Hesa lóggávu hava vit framvegis, men í 2018 ganga øll veiðiloyvini út og fiskivinnan skal skipast av nýggjum ella halda fram í verandi líki við einari líknandi lóggávu, sum vit hava nú. Ein arbeiðsbólkur er settur, at koma við einum tilmæli sum skal vera klárt í august 2016 áðrenn ein politisk viðgerð fer í gongd í løgtinginum. Tit skulu í bólkum royna at koma við góðum ráðum til hendan arbeiðsbólkin við at gera tykkara egna vælgrundaða tilmæli.

Arbeiðsspurningar

1. Greiðið frá søguligu gongdini í føroysku fiskivinnuni síðstu 50 árini
2. Greiðið frá hugtakinum fólksins ogn og gerið tykkara metingar av hvørt hetta hugtakið eigur at hava pláss í einari nýggjari lóggávu
3. Hvat er lívfrøðilig og búskaparfrøðilig burðardygd ?
4. Hvussu skal lívfrøðiliga burðardygdin tryggjast í lóggávuni ?
5. Hvussu skal búskaparfrøðiliga burðardygdin tryggjast í lóggávuni ?
6. Skal útlendskur kapitalur loyvast í fiskivinnuni og hvussu kann lóggávan regulera hetta øki.
7. Skulu sáttmálar á føroyska arvbeiðsmarknaðinum haldast og hvussu kann hetta øki evt regulerast í lógini
8. Greiðið frá muninum á kvotum og fiskidøgum! Skulu vit nýta kvotur ella fiskidagar ella bæði ella okkurt heilt triðja sum stýringsamboð.

Gerið tykkara tilmæli soleiðis at spurningar í stórst møguligan mun eru svaraðir. Tað skal enda við einari framløgu.

Góðan arbeiðshug :)